Argentina, Nigeria, Ongland og Svøríki:

Deyðsbólkurin

Argentina eru millum størstu favorittarnar at vinna HM, men sjálvt ikki teir skulu taka tað sum nakra sjálvfylgju at vinna seg víðari úr bólkaspælinum

BÓLKUR F
Jákup Mørk

Gabriel Omar Batistuta hevur í mong ár talst millum avgjørt bestu álopsleikarar í heiminum, og við 55 málum í 75 landsdystum eigur hann metið á landsliðnum. HM-kappingin verður seinasta altjóða uppgáva hansara, og hóast hann fær harða kapping um álopssessin frá Hernan Crespo, vil hann helst gera alt, til tess at ogna sær HM-gullið sum eitt virðiligt farvæl til altjoða pallin

Mynd: Reuters

Deyðsbólkurin. Dópurin fór fram, so skjótt lutakastið til bólkaspælið í HM var avgreitt, og nakað var eisini um heitið. Við somikið sterkum luttakarum, sum talan er um í bólki F, er bert ein lutur greiður undan HM. 1/8-parts finalunum. Nevnliga at tvey av liðunum, sum annars hava styrki til at gera seg galdandi, ikki koma longur enn til bólkaspælið.

Seinasti møguleiki hjá Batigol

Argentina hevur síðani HM í Fraklandi sýnt eina mest sum óhugnaliga styrki, tá teir hava verið á vøllinum. Í framrættaðu 3-3-1-3 skipanini hjá Marcelo Bielsa vann liðið seg sera sannførandi fram til endaspælið. Einasti av teimum 18 undankappingardystunum, sum endaði við tapi, var útidysturin móti Brasilia.

Og tað eru ikki bert úrslitini, sum hava verið góð. Aloftast hevur spælið verið av slíkum slag, at mótstøðuliðini snøgt ikki hava kunna gjørt nakað. Argentinska blandingin av suðuramerikanskum showbólti samantvinna við styrkini í verjupartinum, sum liðið vanliga hevur, er tykist sera effektiv. Og so eru tað sjálvandi teir leikarar, sum Bielsa hevur til taks. Chamot, Walter Samuel og Ayala í verjupartinum. Gallardo, Zanetti, Simeone, Veron, Kiko Gonzales, Aimar við fleiri á miðvøllinum og ikki at gloyma álopspartin. Ein álopspartur, sum er somikið sterkur, at sjálvt ikki Gabriel Batistuta kann kenna seg tryggan, og har tað ikki so mikið sum var pláss fyri unga stórtalentinum, Javier Saviola.

Júst hjá Batistuta er hetta eisini seinasti møguleikin at vinna HM gull. Áleyparin, sum í 75 landsdystum hevur skotið 55 mál, og sum endiliga gjørdist italskur meistari eftir skiftið til Roma, hevur gjørt av, at hann gevst á landsliðnum eftir HM. Í sínari tíð var Bielsa maðurin, sum fann stórtalentið, og sendi hann á vøllin í bestu argentinsku deildini, og tí kundi tað verið hóskandi, um hann saman við Bielsa endaði landsliðstíðina við HM-steypinum í hondini.

Beckham-skaðin

Í Onglandi er støðan sera spent, nú HM nærkast. Mest sum hvørt mansbarn fylgir við, hvussu heilsustøðan hjá landsliðsskiparanum, David Beckham, er. Hann breyt eitt bein í fótinum, tá argentiski Aldo Duscher framdi eina ljóta takling í fjórðingsfinaluni í Champions League, og síðani hevur bert verið bíðað eftir, hvørt hann verður tøkur til HM. At miðvallarmotorurin, Steven Gerrard úr Liverpool, eisini varð skaddur, var mest sum bert ein smálutur við síðuna av, um ensku blóðini skulu nýtast sum mátistokkur.

Tað tykist hann nú at gerast, og tað er sjálvandi ein styrkur fyri Ongland, men tað eigur tó ikki at gloymast, at liðið eisini er meira enn Beckham. Rætt og slætt, so tykist Ongland í løtuni at hava í øllum førum sterkasta liðið síðani 1990, og lági miðalaldurin ger, at talan helst er um eitt lið, sum hevur eina stóra framtíð fyri sær. Við Sol Campbell og Rio Ferdinand at stýra verjuni, Dyer, Hargreaves, Beckham og Scholes á miðvøllinum og sjálvandi Owen í álopinum, er liðið ein hóttan móti øllum. Væntandi royndirnar kunnu tó gerast truplasta mótstøðan hjá liðnum, men hinvegin spæla leikararnir dagliga í einum av sterkastu deildunum í Europa, so teir eru helst menn at liva við trýstinum.

Og so eiga vit ikki at gloyma, at dystirnir millum Ongland og Argentina vanliga eru nakað serligt. Hvør minnist ikki »Guds hond« hjá Maradona í '86 ella reyða kortið hjá Beckham í '98. Jú – Dramatikkur er í øllum førum væntandi í uppgerðini.

Ov tunt frameftir

Svensku grannar okkara fáa tað trupult í so máta, nú talan verður um somikið sterk mótstøðulið, men teir standa seg kortini aloftast væl, tá stóru kappingarnar eru á skránni.

Í mun til undanfarnar HM-kappingar, so kann tó hesa ferð tykjast, at liðnum væntar tí heilt stóru stjørnuna, sum kann gera munin í avgerandi løtunum í stóru dystunum.

Í verjupartinum er sjáldan nakað at finnast at, og tað er einki at ivast í, at liðið ikki fer at lata fleiri óneyðug mál fara inn, men spurningurin er bara, um teir megna at skapa nóg nógv hinvegin. Er tað nóg mikið við stórspælinum, sum Ljungberg og Larsson hava víst í seinastuni, ella verða Ongland og Argentina ov stórir bitar hjá sviunum? Tað tykist vera størsti spurningurin hjá grannum okkara.

Ørnirnar flúgva lágt

Nigeria hevur vanliga verið mett sum eitt hitt sterkasta afrikanska landið, men hesa ferð tykist innanhýsis ófriður at hava oyðilagt stóran part av fyrireikingunum hjá liðnum, og eitt nú eru nøkur av kendu nøvnunum útihýst frá landsliðsleguni.

Grundað á hetta kann tað tykjast ósannlíkt, at Nigeria vinnur seg úr bólkaspælinum, men liðið telir framvegis leikarar, sum megna at skapa ein góðan dyst. Spurningurin er bara, um samskipanin bæði á og uttanfyri vøllin er somikið góð, at liðið megnar at standa ímóti trýstinum, tá sterku mótstøðuliðini í bólkinum koma herjandi.

Dystirnir:

02.06	Argentina-Nigeria
02.06	England-Svøriki
07.06	Svøriki-Nigeria
07.06	Argentina-England
12.06	Nigeria-England
12.06	Svøriki-Argentina

Italia, Ecuador, Kroatia og Mexico:

Himmalin er aftur bláur

Italia tykist vera greiður favorittur, og so mugu Kroatia og Mexico dystast um, hvør annar skal koma víðari úr bólkinum

BÓLKUR G
Jákup Mørk

Tríggir av leikarunum, sum aftur hava italsku tjóðini vón um hópin av málum á altjóða pallinum. Inzaghi, Vieri og Totti teljast allir millum vandamestu framherjarnar í heiminum

Mynd: Reuters

Italskur landsliðsfótbóltur fekk eina sanna uppreisn, tá liðið kom í finaluna í EM fyri tveimum árum síðani. Talan var kanska ikki um so ógvuliga framsøkið spæl, sum nøkur av hinum londunum býntu, men destruktivi verjufótbólturin, sum liðið áður hevur staðið fyri, var í øllum førum ruddaður burtur. Hetta gav pláss í finaludystinum, og í veruleikanum var liðið bert góðan minutt frá at vinna EM, men tað er so ein onnur søga.

Trap hevur vunnið alt

Grundað á góða avrikið í EM, og á spælið í undankappingardystunum, eru italiumenn nú veruliga farnir at trúgva uppá, at Azzurri, sum liðið verður rópt, kann gera seg galdandi í HM-kappingini. Ikki tí. Liðið stendur seg aloftast væl, men tað so smátt við at vera nakað langt síðani, tá tað nú eru liðin 20 ár, síðani liðið seinast vann HM.

Vanliga hevur liðið ein sera sterkan hóp, og í summar verður talan so avgjørt ikki um nakað undantak. Leikarar sum Vieri, Del Piero, Totti og Inzaghi borga allir fyri góðsku í framrættaða spælinum, og í verjupartinum hevur liðið eisini fleiri av heimsins bestu verjuleikarum, so leikara fyri leikara tykist Italia hava sterkasta hópin í bólkinum.

At teir so eisini hava Trappatoni á beinkinum, ger avgjørt møguleikarnar hjá liðnum enn betri. Trap hevur sum venjari vunnið alt tað, sum vinnast kann við italskum liðum. Hann er taktiskur snillingur av aðrari verð, og seinastu árini hevur hann enntá umstillað sína fótbóltsáskoðan, soleiðis at lið hansara nú eisini hava leikt álopsfótbólt. So tað kann væl vera, at Italia bæði kann vinna og undirhalda hesaferð.

Neyvan bronsa hesaferð

Av hinum liðunum í bólkinum munnu Mexico og Kroatia verða tey, sum stríðast um næsta sessin.

Kroatia vann bronsu við HM í Fraklandi. Enntá í fyrstu royndini hjá landinum í HM, og tað var einki minni enn eitt bragd. Bronsan tá var tó grundað á eitt óvanliga gávuríkt ættarlið av fótbóltsleikarum, og hóast nógvir av hesum framhaldandi eru við á liðnum, so eru árini farin at seta síni spor.

Bóltsnillingurin, Boban, er ikki við longur, og hóast leikarar sum Boksic og Suker framhaldandi eru vandamiklar fyri mótstøðuverjurnar, so kann ikki roknast við, at teir røkka eins langt, sum teir gjørdu seinast, men teir hava avgjørt møguleika at koma víðari í kappingini.

Tað hevur Mexico eisini, og yvirhovur hevur sterka tjóðin í Miðamerika eisini til siðvenju at teir í øllum førum koma víðari úr bólkaspælinum. Sjáldan er tað vorðið til meira enn tað sama, og heiðursmerki er talan ikki blivin um. Hesa ferð hevði liðið stórar trupulleikar í annars veika undankappingarbólkinum, men eitt venjaraskifti í evstu løtu vendi gongdini, og tá vandamikli Blanco so varð klárur at spæla, eftir at hann hevði verið skaddur, kom verulig ferð á. Spurningurin tykist bert vera, um hendan er nóg stór til HM.

Nýggja liðið

Ecuador hevur sjáldan havt eitt stórt orð at siga í altjóða høpi. Seinnu árini hevur liðið tó fingið ein alt større leiklut í Suðuramerika, og hesa ferð vóru tað bert Brasilia og Argentina, sum stóðu seg betri í undankappingini.

Trupult verður tað undir øllum umstøðum hjá nýggja landinum í HM-høpi, og ein kopiering av avrikinum hjá Kroatia seinast verður talan neyvan um. Megna teir at vinna seg víðari úr bólkinum, er nógv vunnið, men hetta í sjálvum sær verður helst ein ivaleysa stórur biti.

Dystirnir:

03.06	Kroatia-Mexico
03.06	Italia-Ecuador
08.06	Italia-Kroatia
09.06	Mexico-Ecuador
13.06	Ecuador-Kroatia
13.06	Mexico-Italia

Japan, Belgia, Russland og Tunis:

Heimavøllurin gevur vónir

Japanarar vóna, at teir fyri fyrstu ferð kunnu vinna seg úr bólkaspælinum, og lutakastið hevur í øllum førum givið teimum ein møguleika fyri hesum

BÓLKUR G
Jákup Mørk

Japan var fyri fyrstu ferð við til HM fyri fýra árum síðani. Tá tapti liðið allar tríggjar dystirnar, men royndirnar frá teirri ferðini hava teir so í skjáttuni nú.

Og japanskur fótbóltur hevur ment seg við rúkandi ferð seinnu árini. Tað eru ikki meira enn eini tjúgu ár síðani, at eitt veruligt menningararbeiði innan fótbóltin varð sett ígongd, men japanum so líkt, so hevur gingið skjótt. Hópur av ungum, evnaríkum leikarum verða nú fostraðir, og spakuliga eru hesir eisini farnir at síggjast í europeiskum feløgum.

Stóra stjørnan er uttan iva Hidetoshi Nakata, men sjálvt ikki hann skal kenna seg vísan í einum plássi á liðnum. Seinastu dystirnar hevur liðið nevnliga spælt bæði kvikan og ágangandi álopsfótbólt, og ikki minst hevur stuðulin frá heimaáskoðarunum gjørt sítt.

Tað er eisini við áliti á heimavallarfyrimunin, at japanar nú vóna, at land teirra hesa ferð kann koma longur enn til bólkaspælið.

Russiska maskinan

Og tað er kanska ikki heilt óhugsandi, at so verður. Sum vertstjóð verður styrkisметingin til lutakastið aloftast lagalig, og tó at Japan skal royna seg móti trimum hampuliga sterkum tjóðum, so kundi tað væl verið munandi truplari, enn tað nú sær út til at gerast.

Russarar eru kanska favorittar at vinna bólkin, og tað er helst eisini tað, sum teir sjálvir ætla. Liðið vann seg hampuliga trygt úr okkara undankappingarbólki, og fótbólturin, sum teir standa fyri, er altíð hin sami. Kontrollerandi, ferðmikið og effektivt plagar tað at vera, og tó at tað ongan tíð hevur borið heilt á mál í HM-høpi, so hevur liðið ofta verið partur av teimum mest undirhaldandi dystunum í HM-søguni.

Verandi liðið telir eisini nakrar leikarar, fyri hvørs viðkomandi hetta helst verður seinasta stóra avbjóðingin, og tað er heilt víst, at hesir meira enn nakað ynskja at geva heiminum eitt minniligt farvæl á altjóða pallinum.

Avbjóðararnir

Hóast Russland soleiðis er favorittur, so slepst ikki undan, at bæði teir og vertstjóðin fáa harða mótstøðu frá Tunis og Belgia.

Reyðu devlarnir úr Belgia eru fyri sættu ferð á raðpartur av endaspælinum, og tað í sjálvum sær er eitt bragd, tá hugsað verður um støddina á landinum. Aloftast standa teir seg eisini væl ,tá teir koma til endaspælið, og í nógvar mátar líkjast teir eitt nú Týskland, sum bara hevur hetta við at gerast betri, so hvørt sum kappingin líður.

Liðið í dag telir tó ikki tær heilt stóru stjørnurnar, sum tað gjørdi í 80'unum. Talan er heldur um eitt sera sterkt kollektiv, har tað kanska bert er Mark Wilmots, sum veruliga skarar burturúr, men júst kollektivið hevur eisini áður verið styrkin hjá Belgia.

Tunis fær kanska eina ógvuliga trupla uppgávu í sín lut, men avskrivast eiga norðurafrikanararnir á ongan hátt. Teir vunnu seg hampuliga lætt ígjøgnum undankappinga, og traditionelt hava lið úr norðara partinum av Afrika ofta staðið seg sera væl í HM-høpi.

Her hevur Tunis tó bert verið tvær ferðir. Báðu ferðirnar hevur bólkaspælið verið endastøðin hjá liðnum, men royndin verður so í øllum førum at gera tað betri hesaferð.

Dystirnir:

04.06	Japan-Belgia
05.06	Russland-Tunis
09.06	Japan-Russland
10.06	Runis-Belgia
14.06	Belgia-Russland
14.06	Japan-Tunis